## Ikki so skemtiligt longur

**Sandur:** Tað stendur illa til við árliga føstulávintsskemtinum, ið plagdi at vera í Virkinum á Sandi. Sitandi nevnd sær seg ikki føra fyri at standa fyri nøkrum skemti, orsaka av at tey eru so fáment. Størstiparturin av nevndini stendur eisini fyri nývali. Á nevndarfundi, ið verður í dag skal avgerast, hvussu verður við føstulávint og øðrum, skrivar heimasíðan bkv.fo. Frá Virkinum siga tey kortini, at um onnur eru, ið hava hug at skipa fyri skemti ella øðrum, so eru tey meira enn vælkomin at venda sær til nevndina.



## Møtir í Mentanarhúsinum

**Fuglafjørður:** Á hvørjum ári skipar missiónshúsið Thabor fyri missiónsviku. Soleiðis verður eisini gjørt í ár, tá missiónsvikan byrjar nú sunnukvøldið. Í fjør byrjaðu møtini í missiónshúsinum og vórðu síðani flutt oman í Mentanarhúsið um vikuskiftið. Hetta eydnaðist so mikið væl, at ein ætlar at endurtaka succes'ina aftur í ár. Talari á møtunum um vikuskiftið er danski presturin og bíbliuskúlalærarin, Erik Holmgaard.

# Tit hava heimsins besta



- Eg vóni at sleppa til skips við onkrum skipi í heyst, sigur týski skógfútin Carsten

**- Føroyar eru seinasta paradisið á jørð, sigur týski ferðamaðurin og skógfútin Carsten Schröder, sum í farnu viku var á stuttari vitjan í Føroyum**

VITJANDI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Høgni Thomsen*

**Norðdepil:** Tað er helst ikki ofta, at tey á fiskavirkinum NORÐFRA fáa vitjan av útlendingum í januar mánaði.

Hetta hendi kortini hósdagin í farnu viku, tá ein bilur við týskari nummarplátu koyrdi oman til virkið í Norðdepli.

Í bilinum vóru eini týsk hjún – Barbara og Carsten Schröder – sum vóru komin higar við einum einasta ynski: At keypa góðan føroyskan fisk, sum verður framleiddur her á virkinum.

- Vit fingu at vita frá Tróndi Leivsson (stjóri í Skógrøkt Landsins) at tit hava heimsins besta og reinasta fisk.

- Henda fiskin vildu vit fegin sleppa at smakka, og tí eru vit her nú. Um ein løtu fara vit við Norrønu til Danmarkar, sigur Carsten, sum er útbúgvin skógfúti.

Sjálvur ætla hann og konan Barbara at eta fiskin heima við hús, men tey ætla eisini at bjóða vinfólkum at royna føroysku vørurnar.

- Og hvør veit – kanska tey eisini fara at koma higar at vitja, og kanska tey eisini vilja keypa tann føroyska fiskin. Hann er í øllum førum góður, slær Carsten fast.

### Oyggjaland í kulda

Frá ungum árum av hevur Carsten havt eitt ynski um at vitja í Føroyum. Ikki fyrrenn í 2008 gjørdist tað veruleiki.

- Nú er ein gamal dreymur gingin út, sigur hann við Sosialin.

Tey hava leingi fyrireikað seg til hesa ferðina, og endamálið var eittans:

- Vit ynskja at sígga, hvussu tit sum fólk liva í harmoni við náttúruna, sigur hann við einum stórum brosi.

Tey hava bæði hvør sín innfalsvinkul til henda "lesnaðin" um ein kann siga tað so: Hon er lækni og hann er skógfúti.

- Tit hava eitt heilt ótrúliga vakurt land – ja, sjálvt í bítandi kulda í januar mánaði, sigur hann við einum brosi.

### Besti fiskurin

Tað er kortini ikki av tilvild at hjúnini bæði eru komin higar til oyggjarnar so mangar ferðir.

Tá hann las til skógfúta, var hann eitt skifti og arbeiddi í Grønlandi. Hetta var heilt afturi í 1975, og hoyrdi tá eitt sindur um hitt oyggjalandið í ríkisfelagsskapinum, Føroyar.

Hinvegin so dáma teimum